# Fiskamerkir og fyrilestrar

HAVSTOVAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikukvøldið 11. november klokkan 19 verður lutakast á Havstovuni um innkomin fiskamerki seinasta árið. Tann, sum vinnur lutakastið, fær 12.500 krónur í virðisløn.

Í sambandi við lutakastið, verður eisini greitt frá doktararitgerðini hjá Peturi Steingrund, sum snúði seg um, hvat hendi við toskinum í nítiárunum.

Havstovan og Magn fara annars í hesum mánaðinum undir áhugavert fyrilestrartiltak kring landið, har Petur Steingrund fer at greiða frá.

Ritgerðin hjá fiskifrøðinginum kom til slóðbrótandi niðurstøður, heldur Havstovan.

Fyrlestrarnir verða hesir: Mánadagin 16. november á Seglloftinum á Tvøroyri, týsdagin 17. november í skúlanum á Giljanesi, mikudagin 18. november í Løkshøll í Runavík, hósdagin 19. november í Atlantis í Klaksvíkm og mánadagin 23. november á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.

Allir fyrilestrarnir byrja kl. 19.00 og eru vælkomin.





# Kúlur rulla aftur í Klaksvík

**Fríggjadagurin og leygardagurin eru karmur um fyrstu stóru kappingina í nýggja billardárinum. Fimm av landsins bestu spæla um heiðurin at vinna Haldor Holm Cup.**

TÍÐINDASKRIV

Fyrsta billardkappingin í hesum billardárinum byrjar í Klaksvík fríggjadag og heldur fram leygardagin. Talan er um Haldor Holm Cup, har fimm av landsins bestu spælarum eru við. Kappingin er eitt slag av upphiting til Føroyameistarakappingina, sum byrjar seinni í ár og heldur fram næsta ár.

Tað eru í ár 20 ár síðani, at fyrsta kappingin um Haldor Holm steypið varð spæld í Klaksvík. Síðani hevur verið kappast á hvørjum ári við undantaki av ár 2000, tá eingin kapping var. Tað var Billardsamband Føroya, sum lat eitt stórt steyp til hesa kapping, sum skuldi heiðra slóðbrótandi arbeiðið Haldor Holm, sáli hevði gjørt fyri billardspælið.

Í ár eru hesir spælarar við: Kristian Sune Høgnesen, Torkild Jacobsen, Jógvan Jørgensen, Steinbjørn í Dali og Jan Müller. Seinasta ár varnn Hallur Joensen kappingina. Annars hava vinnarar hesi seinastu 20 árini verið: Jan Müller, Rene Sørensen, Eirikur Nielsen, Henrik Pedersen, Ólavur Kjølbro, Bjarni Skaalum og Kristian Sune Høgnesen. Seinastu átta árini hevur Kristian Suni Høgnesen verið mest vinnandi spælarin. Hann er farin við sigrinum annaðhvørt ár. Fyrsti vinnarin av kappingini í 1989 var Jan Müller.

Kappast verður í nýggju hølunum hjá Klaksvíkar Billardfelag, sum liggja millum Klaksvíkar Klubba og KÍ høllina.


# Vilt tú tryggja okkara marknaðarføring?



**Vit stevna móti settum málum og avbjóðingum á føroyska marknaðinum og í altjóða høpi.**

Kundavinarlig, munagóð og kreativ marknaðarføring, umvegis framsøkin og nýhugsandi marknaðarfólk, eru týðandi liðir í at røkka málum okkara.

Fyri at styrkja og menna okkum innan hetta týðandi økið, leita vit nú eftir rætta marknaðarfólkinum, ið m.a. skal taka sær av marknaðarføringini hjá samtakinum. Er hetta tú?

**Arbeiðsøki**

Tú kemur at starvast á økinum fyri marknaðarføring, ið er partur av deildini fyri Menning, KT & Marknaðarføring. Økið tekur sær av allari marknaðarføring og samskifti hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, Betri pensjón og TF Holding. Økið samskipar og hevur ábyrgdina av eitt nú lýsingarherferðum, kundatiltøkum, heimasíðum, sponsoratum, marknaðarføringsráðgeving, samskifti og øðrum, ið hoyrir marknaðarføring til.

**Vit kundu hugsað okkum, at tú ...**

> hevur viðkomandi útbúgving og/ella royndir og hug at arbeiða innan marknaðarføring
> hevur royndir innan verkætlanararbeiði/leiðslu av verkætlanum
> ert tænastusinnað/-ur, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til at samstarva
> dugir væl at raðfesta, at halda ásettar freistir og ert framsøkin
> ert kreativ/ur og nýhugsandi
> hevur lætt lyndi og sært tað skilagóða í broytingum
> dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
> dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga

**Vit kunnu bjóða tær**

Fjølbroytt og avbjóðandi starv í einum spennandi samtaki, sum er í stórari menning. Eitt starv í einum samtaki við greiðum málum, góðum arbeiðsumstøðum og virkisfúsum starvsfólkum, ið grunda sítt virksemi á virðini - vilja til lønandi vøkstur, virðing fyri heildini, ágrýtni og nærlagni, langtíðarhugsjón og broytingarsinni. Stórur dentur verður lagdur á starvsfólkatrivna og førleikamenning.

Til rætta fólkið hava vit eitt gott og avbjóðandi starv við kappingarførari løn, góðum setanartreytum, sjálvstøðugum arbeiðsøki og góðum møguleikum fyri støðugari førleikamenning, har viðkomandi sjálv/sjálvur verður við til at byggja starvið upp og mynda tað frameftir.

**Lønar- og setanartreytir**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar í Føroyum. Lønin verður ásett í mun til royndir og førleika.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Kristinu Háfoss, deildarstjóra fyri Menning, KT & Marknaðarføring á tlf. 21 00 36 ella við at senda teldupost til kh@trygging.fo

Starvið sum marknaðarfólk verður sett 1. februar 2010 ella eftir nærri avtalu.
Umsókn við viðkomandi skjølum skal sendast til:
Tryggingarfelagið Føroyar P/F, Att. Starvsfólkadeildin
Postboks 329, 110 Tórshavn

Til ber eisini at søkja umvegis heimasíðu okkara:
www.trygging.fo

Umsóknarfreistin er 25. november 2009 kl. 12.00.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari